umborð

# Fiskimenn hava tað ikki ringt

**Formaðurin í Reiðarafelagnum, Viberg Sørensen, ið sjálvur fór til skips sum 15 ára gamal, heldur ikki, at føroyski fiskimaðurin hevur tað ringt. – Skipini eru sum heild góð, og inntøkurnar hava ikki verið ringar, men heldur góðar, sigur hann**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Søgan um Viberg Sørensen, er søgan um 15 ára gamla dreingin, sum valdi at søkja sjógvin.

Pápin Anskar var skipari, og tá ið nýbygningurin Gudmund kom sum stállínubátur á heysti í 1961, var Viberg við á fyrsta túri.

Saman við pápa sínum og øðrum monnum bar leiðin til Grønlands á saltfiskaveiði, og ein slíkur túrur vardi vanliga millum hálvan triðja og tríggjar mánaðir. Viberg sigldi soleiðis í fleiri ár saman við pápa sínum.

- Eg havi siglt alt mítt lív, sigur maðurin, sum í fjør heyst gjørdist formaður í Reiðarafelagnum eftir at hava sitið í nevnd og sum næstformaður í felagnum í fleiri ár.

Viberg, sum er farin um tey seksti, lyfti arvin eftir Jákupi Sólstein, og nú er næstformaður felagsins, Jónsvein Knudsen.

- Eg havi siglt lítið seinastu 10 árini, og tí havi eg góðar stundir at taka mær av tí arbeiði, sum nevndin í Reiðarafelagnum nú hevur víst mær álit at røkja.

Viberg gjørdist fyrstu ferð skipa-eigari í 1970, tá ið hann keypti skittaran Norðland.

Øll hesi mong ár síðan hevur hann fingist við skip og skiparakstur, hóast hann seinnu árini ikki hevur ført skip sjálvur.

Í dag eigur hann garnaskipið Anitu, sum er uppkallað eftir einastu dóttrini.

- Sonur mín Ragnar, sum er yngstur í røðini av trimum børnum, førir Anitu, og miðlingurin er skipari við norskum kemikaliutangaskipi.

Í móðirættini hjá Vibergi varð abbin gamal skipari, róptur Viberg á Sevmýru. Abbin í faðirættini, Janus, sigldi eisini í sínum góðu árum, men honum dámdi eisini væl at fáast við jørð.

Viberg hevur verið undangongumaður á fleiri økjum innan føroyska fiskivinnu, og hann var millum teir fyrstu, sum fór at fiska svartkalva og havtasku við gørnum.

Eisini var hann ein av slóðar-unum í royndini at gera tunfiskaveiði til vinnu her hjá okkum.

Nú situr hann so sum formaður í Reiðarafelagnum og er soleiðis andlitið hjá skipaeigarum úteftir.

Hann sigur seg harmast um tað rák, sum hevur verið í seinastuni um, at tað skal vera so ótrygt, keðiligt og lítið gevandi at sigla við føroyskum fiskiskipum.

- Vit síggja og hoyra í heilum, at føroyskir fiskimenn rýma av landinum, tí tað skal vera so ótolandi at vera fiskimaður her heima. Róð verður uppundir, at einki skil skal vera á, at sáttmálar verða brotnir – og at sjálvt lógarverkið eisini svíkur fiskimannin. Arbeiðsdagarnir eru langir og trygdin vánalig, verður sagt upp í saman. Tað skal snøgt sagt ikki vera siglandi í Føroyum.

Hann heldur, at eitt tað mest dapurskygda, hann hevur sæð á prenti í hesum sambandi, er samanburðurin millum føroyskar fiskimenn og ein kúgaðan fólkabólk í Burma.

- Róð verður ferð eftir ferð uppundir, at alt er so gott í okkara grannalondum – ikki minst í Noregi, sum ofta verður tikið fram, og tí freistast tú at spyrja, um teir, ið umboða okkara fiskimenn, eru umboðsmenn fyri norðmenn.



*Viberg Sørensen harmast um, at mistreysti verður sátt niður í ungar menn, sum kundu hugsað sær at søkt sjógvin. - Eg dugi ikki at síggja nakað endamál við at sáa mistreysti millum sjófólk, sigur hann*

Viberg sigur, at er tað veruliga soleiðis, at føroyskir fiskimenn, sum sigla her heima, heldur vilja sigla eftir norskum enn føroyskum sáttmála, fer Reiðarafelagið ikki at seta seg upp ímóti hesum.

Føroyskir sáttmálar eru betri enn aðrir, og tað er ongastaðni, at fiskimaðurin fær ein so stóran part av veiðivirðinum, sum teir fáa við føroyskum fiskiskipum.

- Eg havi tosað við føroyskar fiskimenn sum sigla í Noregi. Teir siga, at hevði fiskiskapurin í føroyskum sjógvi verið á leið hin sami – og við somu fiskasløgum - sum í norskum sjógvi, høvdu teir tjent munandi meira her heima. At meira er at fáa av dýrari fiskasløgum í eitt nú norskum sjógvi enn í føroyskum, er nakað, sum vit ikki kunnu gera nakað við.

Formaðurin í Reiðarafelagnum harmast um, at mistreysti soleiðis verður sátt millum ungar menn, sum kundu hugsað sær at søkt sjógvin.

- Eg dugi ikki at síggja nakað endamál við at sáa mistreysti niður í okkara fiskimenn.

Hann heldur, at tað er gott at vera fiskimaður í Føroyum.

- Skipini eru sum heild góð, menn tjena væl, og teir sleppa til hús so skjótt, skipið hevur lagt til bryggju. Haraftrat kemur sosiala samveran umborð, har tú í messuni kanst tosa títt egna móðirmál – og um viðurskifti, sum eru viðkomandi. Flestu menn kenna hvønn annan og í fleiri førum kenna teir eisini røturnar hjá hvørjum øðrum, sigur Viberg Sørensen.